# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 27.03.2023 kl. 16.30

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Ronni Hammer |
| | Niels Olaf Eyvindsson |
| | Eir J. Norðberg |
| | Gunnhild Mortensen |
| | Thorstein Thomsen |
| Ikki møtt: | Martin í Nesi |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – játtað og kemur á skrá sum mál nr. 8.

1. **102-30-2023: Umsókn um stuðul til nýggj ljós í Ranhøll.**

Søkt verður um stuðul til nýggj ljós til Ranhøll, sambært tilboði frá MR-EL.

**Fíggjarnevndin 24.03.2023:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla við at gjalda fyri nýggj ljós til Ranhøll kr. 26.509,30.

**Avgerð**:

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

2. **102-33-2023: Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Hvalbiar Sóknar Kappróðrarfelag.**

Søkt verður um stuðul kr. 25.000,00, umframt at báturin kann standa inni í tí eina neystinum í Nesi.

**Fíggjarnevndin 24.03.2023:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla Hvalbiar Sóknar Kappróðrarfelag við kr. 25.000,00, treytað av, at báturin verður mannaður. Viðvíkjandi neystunum í Nesi, eru hesi ikki tøk, tá annað er leigað út og hitt verður brúkt sum goymsla hjá kommununi.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at stuðla við kr. 25.000,00. Viðvíkjandi neystunum í Nesi, eru hesi ikki tøk, tá annað er leigað út og hitt verður brúkt sum goymsla.

3. **102-36-2023: Góðkenning av roknskapi 2022 hjá Hvalbiar skúlabókasavni.**

Roknskapurin hjá bókasavninum fyri 2022 javnvigar við kr. 33.738,00.

**Trivnaðarnevndin 26.03.2023:**

Nevndin hevur góðkent og undirskrivað roknskapin.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at góðkenna roknskapin hjá Hvalbiar skúlabókasavni 2022.

4. **<u>102-34-2023: Umsókn um sundurbýti – matr. nr. 179, Hvalba</u>.**
   Søkt verður um at býta húsalutin Bíarvegur 101 frá restini av ognini.
   **<u>Avgerð</u>:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um sundurbýti.

5. **<u>102-35-2023: Umsókn um sundurbýti – matr. nr. 108a, Hvalba</u>.**
   Søkt verður um, at trøðin n.f. Norðbergsvatn á 4.104 m2 verður frábýtt.
   **<u>Avgerð</u>:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um sundurbýti og geva undantak í mun til støddina.

6. **<u>102-26-2023: Umsókn um byggiloyvi til hjall á matr. nr. 19e, Hvalba</u>.**
   Søkt verður um byggiloyvi til hjall/úthús á matr. nr. 19e, Hvalba.
   **Tekniska nevnd 22.03.2023:**
   Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi.
   **<u>Avgerð</u>:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og treytum annars sambært BK17.

7. **<u>102-26-2022: Byggisamtyktin – innkomið skriv</u>.**
   Innkomið skriv vegna eigararnar av matr. nr. 200a, Hvalba, har mótmælt verður, at smiðjan á Bíarvegi 110 verður býtt frá restini av matr. nr. 200a.
   **Tekniska nevnd 22.03.2023:**
   Nevndin mælir til at ganga mótmælinum á møti og ikki gera broytingina í byggisamtyktini.
   **<u>Avgerð</u>:**
   Einmælt samtykt at ganga mótmælinum á møti.

8. **<u>102-00-2023: Tilboð uppá oljutanga við bátahylin frá Magn</u>.**
   Tilboðið frá P/F Magn, dagfest 02.03.2023 er kr. 41.875,00 íalt v/MVG.
   **Fíggjarnevndin 24.03.2023:**
   Samtykt varð einmælt at taka av hesum tilboði.
   **<u>Avgerð</u>:**
   Einmælt samtykt.

9. **<u>Ikki almenn mál</u>.**
   Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.15

| | | |
|---|---|---|
| Janus Thomsen | Ronni Hammer | Niels Olaf Eyvindsson |
| Eir J. Norðberg | Gunnhild Mortensen | Thorstein Thomsen |